Rás 2 FM 102

BINGO

Byrjar 25. apríl

kr. 25,-

hvønn sunnudag á Rás2 kl.17.00

vinn pengar

Eyka vinningur hetta vikuskiftið kr. 20.000,-

Kappingin er stuðlað av:

Spf. Eyðbjørn Hansen
Bílasala og Verkstaður
Verksstøðið: Á Ryggi 1 • FO-100 Tórshavn
Sala: J. á Torfu 50 • FO-370 Klaksvík
Fax: 31 14 95 • Tlf. 31 14 95
Opið er mánad. - fríggjad. kl. 08.00-16.10
Opið er mánad. - fríggjad. kl. 08.00-16.10

SUZUKI
www.suzuki.fo

Tel. 55 99 99 • Ring og sig BINGO!
Sølustøð: Posthúsum og vanligum sølustøðum kring landið

Í sambandi við nýggja
Brandtex®
shop, selja vit hesa vikuna
alla Brandtex vøru - 10%

eisini ymiskar t-shirts
bert 98,-

Vælkomin inn á gólvið
Skálabúðin

Sosialurin 141000

FAROE LAW

bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen, advokat ella
Kára á Rógvi , adv.fulltrúa
um tygara tørv

Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 - fax 359901
mobil 219902 - 222857
faroe-law@faroe-law.fo
http://www.faroe-law.fo

Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 511723 - Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 141000

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3763
Navn: Sp/f 04.04.04.
Adressa: Skansavegur 1, Box 85, 110 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 01.04.2004
Viðtøkudato: 01.04.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Sigmund Poulsen, undir Gráasteini 17, 100 Tórshavn og Jákup Páll Nielsen, Mýrisnípuvegur 21, 100 Tórshavn.
Stjórn: Sigmund Poulsen, undir Gráasteini 17, 100 Tórshavn og Jákup Páll Nielsen, Mýrisnípuvegur 21, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift hjá einum stjóra.
Grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.04.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamálið er at reka advokatvirksemi.

Skráseting Føroya tann 22. apríl 2004
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:
Skrásetingar-nr. Sp/f 3762

Navn: Sp/f Undir Torvbrekku
Adressa: 490 Strendur

Kommuna: Sjóvar Kommuna
Stovningardato: 31.03.2004
Viðtøkudato: 31.03.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnari: Tummas Johansen, 490 Strendur.
Stjórn: Tummas Johansen, 490 Strendur.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av stjóranum.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut.revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamálið er at fáast við fiskivinnu og hava annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 22. apríl 2004
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:

A.**Navn:** P/F S.M.S. (P/F-nr. 207), 100 Tórshavn.
og
B. **Navn:** P/F Perlan í SMS (P/F-nr. 3359), 100 Tórshavn.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F-lógini.

Skráseting Føroya tann 23. apríl 2004
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3764
Navn: Sp/f 20. apríl 2004
Adressa: 520 Leirvík

Kommuna: Leirvíkar Kommuna
Stovningardato: 20.04.2004
Viðtøkudato: 20.04.2004
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Sp/f Sæborg, 520 Leirvík (Sp/f 3034).
Stjórn: Tummas Justinussen, Dalakrókur 17, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 20.04.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, skiparakstur og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 20. apríl 2004
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 2061, P/F Christian í Grótinum, 700 Klaksvík.

Viðtikið 01.04.2004 at lækka partapeningin við annulatión av egnum partabrøvum sambært § 48b, jvb kap. 7 í P/F-lógini, við kr. 250.000,00 til kurs 20.800 til kr. 500.000,00, har B: partabrøv lækka við kr. 250.000,00 til kr. 0,00 eftir at proklama er runnin.

Skráseting Føroya tann 23. apríl 2004
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:

Skrásetingar-nr. P/F 3761
Navn: P/F FB Holding
Adressa: Húsagøta 3, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 15.04.2004
Viðtøkudato: 15.04.2004
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 500.000,00 til kurs 1000.
Stovnari: P/F Føroya Banki, 100 Tórshavn (P/F 10).
Nevnd: Jørn Astrup Hansen, Heygsbreyt 4, 100 Tórshavn (formaður), Janus Petersen, Varðabú 1, 100 Tórshavn og Jean Djurhuus, Kovalág 2, 100 Tórshavn.
Stjórn: Torbjørn Andreasen, Niðaragøta 2-8, 188 Hoyvík.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av allari nevndini ella av nevndarformanninum saman við stjórnini.
Grannskoðari: Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn og P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
Fyrsta roknskaparár: 15.04.2004 - 31.12.2004
Endamál: Endamál felagsins er at ogna sær kapitalpartar í vinnufyritøkum, við tí fyri eyga at endurskipa vinnufyritøkuna og hereftir selja fyritøkuna.

Skráseting Føroya tann 23. apríl 2004
Kristin Balle

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 2948, Sp/f á Krossbakka, 650 Toftir.

Nevnd:
Farin úr nevndini: Aksel Petersen, 650 Toftir.
Innkomin í nevndina: Johannes Johannesen, 640 Rituvík.

Skráseting Føroya tann 23. apríl 2004
Kristin Balle

GEVID BLÓÐ

Frítíðarskúlin í Vági

Børn verða innskrivað til skúlaárið 2004/2005.

Seinasta freist er 01. juni 2004.

Frítíðarskúlin í Vági
Telefon 37 33 83 / 22 94 82

Vága Dansifelag

Ársveitslan 7. februar

Góði tú, sum hevur tikið eina myrkabláa knappatroyggju feil, sum hevur Sigmundarkross stimaknappar.

Tína havi eg.

Vónandi fái eg hana aftur, tað hevði glett meg ómetaliga nógv.

Tlf. 322953/212953
ella Edvard í Skorini

Bilar til sølu

Hesi akfør hjá Klaksvíkar Kommunu verða hervið lýst til sølu fyri hægstbjóðandi.

Slag:	Mercedes 814 bussur við 24 setrum
Árgangur:	1994
Koyrt:	399.000 km
Eykaútgerð:	Bakkikamera og lyft. Eykasett av píkadekkum fylgja við. Í góðum standi.

Slag:	Toyota Dyna v/ krana og grabba
Árgangur:	1986
Koyrt:	165.500 km Eyka sett av píkadekkum fylgja við.

Boð kunnu verða latin á telefon 456387 ella 225158 innan 10. mai 2004.

Klaksvíkar Kommuna

Kokkur

Søkt verður eftir royndum kokki at standa fyri matgerðini við køki okkara at byrja beinanvegin ella sambært nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er mánadag til fríggjadag kl. 08 til uml. 14.00.

Keypmaðurin »úti í Grønlandi«
Johannes Andreasen
Grønlandsvegur 16 · 100 Tórshavn
Tlf. 312087

Kunngerð

frá útskiftingarnevndini í Sørvági

Útskiftingin av Selvíkarhaga í Sørvági varð endað við úrskurði sagdur á nevndarfundi á Matrikulstovuni 18. mars. Hesin úrskurður verður latin til ákæru frá 23. apríl 2004 sbrt. kap. 9 í útskiftingarlógini frá 27. mars 1939.

Eftir kap. 9 kunnu útskiftingin og úrskurðurin hjá útskiftingarnevndini kærast til yvirútskiftingarnevndina, og er kærufreistin 3 mánaðir frá 23. apríl at rokna. Kærufreistin er úti 23. juli 2004.

Møguligar kærur skulu vera skrivligar og stílast til Yvirútskiftingarnevndina, Sorinskrivarin, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn.

Útskrift úr gerðabókini og útskiftingarkortið liggja frammi hjá Sørvágs kommunu og á Matrikulstovuni, til kærufreistin er úti.

Útskrift úr gerðabókini, útskiftingarkort og avrit av kap. 9, "Anke og Gennemsyn" í útskiftingarlógini er sent øllum eigarum í Selvíkarhaga.

N. v.
Øssur Á. Midjord
útsk. form.

Hølir í Tórshavn til leigu

Skrivstovuhøli til leigu.
Hølini er uml. 100 m² og er møguleiki fyri at víðka til 200 m². Hølini hava egna inngongd og møguleika til allar hentleikar sum t.d. toilet, køk. vm.

Eisini er goymsluhøli 200 m² til leigu. Høli hevur 2 portur sum eru 4,0 x 4,5 metur til støddar hvørt. Toilet og aðrir hentleikar eru í goymsluhølinum.

Sosialurin
Box 76 · FO-110 Tórshavn
Bill.mrk. 609

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsfólk

Søkt verður eftir arbeiðsfólki til asfaltarbeiði. Kunnleiki til asfalt/entrepenørmaskinur er ein fyrimunur, men eingin treyt.

Áhugaði verða biðin at venda sær til Snarskivuna.

SNARSKIVAN

Skrivstovulærlingur søkist

Kundi tú hugsað tær eina framtíð innan skrivstovuyrkið?

Vit hava brúk fyri einum skrivstovulærlingi (m/k).

Vit kunnu bjóða tær:
- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu, har tú gerst partur av einum góðum toymi, og har arbeiðsandin er av teim bestu
- Tryggar arbeiðsumstøður
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.

Lærutíðin er ávíkavist 2 ella 3 ár.

Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri at taka eina hjálpandi hond í tá á stendur. Til tíðir kann vera sera nógv at gera.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Jan Danielsen, stjóra.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og ummælum í seinasta lagi 11. mai 2004.

pf Klement Petersen

Tlf. +298 447560 · Fax +298 448460
e-mail: jandan@klementpetersen.fo

Pf. Klement Petersen er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 9 fólk í starvi. Vit selja í høvuðsheitum tilfar til byggivinnuna og til hús, so sum køkar, hvítvørur, tak, gólv o.m.a.

Avloysari

fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi

Søkt verður eftir avlosara at arbeiða 3/4 tíð frá 9. august 2004 og fyribils til 11. februar 2005.

Starvið umfatar
Alt vanligt skrivstovuarbeiði í samband við skúlan.

Førleikakrøv
Fólk við skrivstovuútbúgving hava fyrimun. Í starvinum hevur tú samband við nógv fólk, bæði innanhýsis og uttanhýsis, og mást tú tí vera opin og virkin.

Setanartreytir
Sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreist
Umsóknin skal vera Handilsskúlanum á Kambsdali í hendi í seinasta lagi mikudagin 19. mai 2004. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til deildarstjóran á tlf. 444 900.

Føroya Handilsskúli
Kambsdalur · 530 Fuglafjørður
Tlf. 444 500 · Fax 444 901
Teldupostadr. fh@kambsdal.olivant.fo